# Bøkur skapast



VEGURIN HJÁ BÓKINI FRÁ BYRJAN TIL ENDA

At framleiða eina bók krevur nógv arbeiði. Mong lið eru, heilt frá hugskotinum hjá rithøvundanum og til lidna bókin liggur í bókabúðunum.

Her royna vit at geva tykkum innlit í øll liðini, ein bók fer ígjøgnum.







## Grafisk sniðgeving














## Film og montaga

1 RITHØVUNDUR skrivar handritið. Fyrr vóru handritini skrivaði við hond ella skrivimaskinu, men nú á døgum er teldan mest nýtta amboðið.

2 GRAFIKARIN fær so handritið, sum oftast sum teldutøkan tekst. So verður byrjað at umbróta bókina. Tað er umráðandi, at bókin er vøkur og løtt at lesa, eins og tað hevur stóran týdning at perman er vøkur.



3 RÆTTLESTUR. So fer bókin til rættlestur og málsliga viðgerð. Umbrótingin ferðast so aftur og fram frá rættlesara til umbrótara, til kundin er nøgdur. Hetta kann vera upp til fleiri ferðir.

4 REPRO. Umbrótingin verður so send til útskjótingar. Har verða síðurnar skotnar út til 16 síðurs ørk, sum so verða send til fotosetaran, sum framleiðir filmirnar.





5 MONTERING OG PLÁTUGERÐ. Filmirnir verða so lagdir omaná aluminiums plátur, og verða lýstir í plátubrennara. Pláturnar verða so latnar prentaranum.